

## Misbrúka tablettir

Hjá nógvum donskum sjúkrasystrum er arbeiðsdagurin vorðin so strævin, at tær taka tablettir fyri at doyva møðina, skrivar blaðið metroXpress. Blaðið hevur fingið at vita, at 25 sjúkrasystrar fáa í løtuni viðgerð ímóti tablett- ella rúsdrekkamisnýtslu, og at fleiri sjúkrasystrar velja arbeiði, sum gevur teimum atgongd til tær røttu tablettirnar. Sjúkrasystrafelagið veit um trupulleikarnar og sigur, at teir eru nógv øktir tey seinastu árini.

## Veðrur í býnum

Summastaðni í Føroyum hava fólk framvegis trupulleikar av, at seyðurin gongur millum húsini um veturin, men hetta er ikki ein serføroyskur trupulleiki. Sunnukvøldið fekk løgreglan í danska býnum Tønder boð um, at ein veðrur gekk og mól mitt í býnum. Veðrurin vísti seg ikki at vera so styggur, so tað eydnaðist løgregluni at taka hann. Hann hevði merki í oyranum, so tað var lætt at finna eigaran, skrivar Jydske Vestkysten.

# Útgerð til brunatrygd frá tryggingunum

**Framyvir fara allir nýggir tryggingartakarar at fáa í boði útgerð til brunatrygd frá tryggingarfeløgunum. Ongar ætlanir eru um at lata útgerðina til gomlu kundarnar**

BRUNATRYGD
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo



*Ali Celebi stjóri hjá Trygd sigur, at tey síðani á sumri í 2005 hava latið ein sokallaðan brandpakka til kundar, sum byggja nýggj hús. Framyvir fara tey helst eisini at bjóða útgerðina til tey, sum tryggja gomul hús.*

Tað hevur mangan verið ført fram, at tryggingarfeløgini áttu at givið viðskiftafólkunum útgerð til brunatrygd. Hetta verður partvíst gjørt í løtuni, men framyvir fara øll, sum tekna nýggja trygging at fáa tilboð um tílíka útgerð. Sambært báðum tryggingarfeløgunum eru ongar ætlanir um at bjóða gomlu kundunum trygdarútgerðina, og eru grundgevingarnar fyri hesum millum annað, at tað ikki er uppgávan hjá tryggingarfeløgunum at máa støðið undan teimum, sum selja trygdarútgerð. Hetta sigur Edvard Heen frá Tryggingarfelagnum. Harumframt eiga flest øll húski í dag trygdarútgerð, sigur Ali Celebi frá Trygd.

Í vikuskiftisblaðnum skrivaðu vit enn einaferð um ein álvarsligan eldsbruna, sum kundi verið forðaður, um roykvarnarar vóru í húsinum. Her var talan um eina familju úr Miðvági, sum bert hevði búð í einum eldri húsum í eina viku. Tíbetur var ongin fólkaskaði, men húsini fórust somikið illa, at tey nú verða tikin niður og bygt upp aftur.

### Til allar nýggjar kundar

Hjá tryggingarfelagnum Trygd sigur Ali Celebi stjóri, at tey síðani á sumri í 2005 hava latið ein sokallaðan brandpakka til kundar, sum hava bygt nýggj hús. Í brandpakkanum er eitt brandteppi, eldsløkkjari og roykvarnarar. Spurdur, um tey eisini hava ætlanir um at lata slíka útgerð til fólk, sum tryggja eldri hús, sigur hann, at tað hava tey ikki gjørt higartil, tí fólkini eiga ofta útgerðina.

- Men hóast tey helst eru fá, hava vit ætlanir um framyvir at bjóða útgerðina til øll, sum tekna eina húsatrygging hjá okkum, sigur Ali Celebi. Hann vísir á, at tað at bjóða fólki brandpakkar, er ein liður í tí at bjóða eina góða tænastu, sum samstundis gevur meining.

- Tað er eisini í okkara áhuga at minka um vandarnar og skaðarnar, sum standast av eldi. Um til dømis eldur kemur í eitt sjónvarp ella í ein lampuskerm, so kann eitt brandteppi forða fyri, at eldurin breiðir seg, sigur hann.

### Skundar undir málið

Hjá Tryggingarfelagnum Føroya, sigur Edvard Heen, varastjóri, at tey higartil ikki hava givið kundum trygdarútgerð, men at tey leingið hava havt ætlanir um hetta.

- Tað hava verið tveir álvarsligir eldsbrunar í Vágum seinastu tíðina. Hesir hava avgjørt skundað undir málið, og innan leingi fara vit at bjóða nýggjum kundum roykvarnarar, sigur Edvard Heen. Tryggingarfelagið sigur, at tey hava keypt nakrar roykvarnarar, sum fara at verða latnir kundum í sambandi við átøk um brunatrygd, sum verða sett í verk komandi tíðina.

### Ávísur hugburður

Sambært Ali Celebi frá Trygd stava nógvir tryggingarskaðar frá einum ávísum hugburði hjá fólki, har tey gloyma at lata aftur og sløkkja eftir sær.

- Eitt nú, tá tú setir bilin í tómgongd ella letur ljósið verða tendrað, tá tú fer út. Tá tú gloymir at sløkkja fyri ovninum ella kókiplátunum ella letur vatnið renna. Hetta eru alt skaðar, sum kundu verið fyribyrgdir, og sum, umframt at dálka umhvørvi og vera kostnaðarmiklir, eisini økja um vandan, sigur Ali Celebi.



BALLAÐI SEG HJÁ MAMMU OG BJARGAÐI FAMILJUNI

Um fýratíðina mánanáttina í síðstu viku kom eldur í eini sehús í Miðvági, og alt sum inni var brann. Av tí at familjan bert hevði búð í húsinum í eina viku, vóru roykvarnarar ikki settir upp. - Tað er einki minni enn eitt undur, at vit eru á lívi. Eldur kann koma nær sum helst, eisini fyrstu vikuna, siga Eyðdis og Marner, sum staðiliga heita á øll um at fáa brunatrygdina í rættlag beinanvegin, flutt verður inn

Síða 4-5

*Í Sosialinum um vikuskiftið vísti Marner Hansen, húsaeigari úr Miðvági á, at tryggingarfeløgini áttu at útflýggjað roykvarnarar til kundarnar.*
*- Tað hevði heilt sikkurt loyst seg fíggjarliga, tí tað er sera kostnaðarmikið at skula lata endurgjald fyri eini hús sum okkara, segði hann, eftir at alt sum inni var, brendi burtur í eldsbrunanum í fyrru viku. Sum støðan er í løtuni, hevði hann ikki fingið í boði trygdarútgerð frá tryggingarfelagnum, men hetta verður helst broytt innan alt ov leingi.*



*Edvard Heen, varastjóri hjá Tryggingarfelagnum Føroya sigur, at tey higartil ikki hava givið kundum trygdarútgerð, men at tey leingi hava havt ætlanir um hetta.*
*- Eldsbrunin í Miðvági hevur avgjørt skundað undir, so vit innan leingi fara at bjóða nýggjum kundum roykvarnarar, sigur Edvard Heen.*



*Oftast letur onkur lív, um ongin ávaringarskipan er, tá eldur kemur í um náttina. Vanliga náa fólk ikki at vakna, tí tey lukta ikki roykin, men sovna burtur av koltvíiltunni, sum verður upptikin í blóðinum 200 ferðir skjótari enn vanlig ilt. Men roykvarnarar varnast eldin, longu tá hann kyknar, og kunnu soleiðis varskógva húsfólkunum.*